***Ársaðalfundur***

**Firvaldar lýsir til aðalfund 06.02.16 kl.18.00 í Egtved Forsamlingshus, Egtved.**

**Skrá sambart lógir felagsins:**

1. Val av orðstýrara.
2. Frágeriðing um felagsarbeiði í farna árið.
3. Framløga av grannskoðaðum roknskapi við status til góðkenningar.
4. Ásetan av limagjaldi.
5. Innkomin uppskot.
6. Val av nevndarlimum.
   Julius(Formaður) og Jan(Kassameistari) standa fyri vali – báðir taka móti afturvali
7. Val av 2 tiltakslimum
8. Val av 1 grannskoðara.
9. Ymiskt.

**Ùrdráttur úr lógum felagsins**

***Grein 16***

*Uppskot, ið ynskjast viðgjørd av aðalfundinum, skulu verða nevndini í hendi seinast 14 dagar undan aðalfundinum. Allir spurningar sum verða tiknir upp á aðalfundi og eykaaðalfundi verða avgjørdir við vanligum meiriluta.*

***Grein 17***

*Valrætt hava bert teir limir, sum eru møttir til fundar og hava goldið limagjald.*

*Veljast kunnu allir limir.*

*Um so er, at ein limur verður valdur uttan at vera staddur á fundi, kann valið bert góðtakast, um viðkomandi áðrenn fundin skrivliga hevur váttað, at hann tekur ímóti vali.*

**Firvaldar Nevndin**